Eysturkommuna

## Hugskotskapping

Eysturkommuna bjóðar hervið til hugskotskapping viðv. navni til nýggja dagstovnin í Leirvík.

Ynskiligt er at fáa eitt stutt navn, sum fellur væl og sum møguliga samljóðar við virksemi á stovninum.

Vinarligast sendið navnauppskotið saman við frágreiðing um, hví tygum halda tygara navn vera hóskiligt, til Eysturkommunu, og merkið brævbjálvan "Navnakapping".

Navnið á luttakaranum skal ikki skrivast á navnauppskotið ella frágreiðingina, men leggjast í ein annan afturlatnan brævbjálva, saman við uppskoti og frágreiðing.

Freistin at senda inn er 26. juni 2009 kl. 13.00.

Virðisløn uppá kr. 3.000,- verður latin fyri besta hugskotið.

Eysturkommuna tilskilar sær, um neyðugt, rættin ikki at nýta vinnandi uppskotið.

Postboks 30 · 510 Gøta · eystur@eystur.fo · www.eysturkommuna.fo




*Shefa-2 kaðalin hevur fingið skaða, men Farice og Cantat-3 eru í lagi, so tað skuldi ikki seinkað netferðsluni munandi*

# Shefa-2 er slitnaður

Kaðalin, ið bindur Føroyar við umheimin innan telesamskifti er slitnaður. Hetta váttar Páll Vesturbú, stjóri á FT-net.

Eitt skip hevur helst rakt Shefa-2 kaðalin við Orknoyggjar, hóast tað ikki kann sigast við vissu. Men staðfestast kann, at kaðalin óvirkin

Hetta skuldi sambært Føroya Tele ikki merkt brúkaran, tí Cantat-3 og Farice kaðalin kunnu nýtast, men Páll Vesturbú vil ikki pástanda, at tað als ikki kemur at merkja ferðina hjá internetbrúkarum í Føroyum.

Greitt er, hvar kaðalin hevur fingið skaða, og sambært Páll Vesturbú, kann hann vera gjørdur um umleið eina viku.




www.taks.fo

TAKS

## Kunning um broyting í lóg um arbeiðsmarknaðareftirløn

Hendan kunning er serliga viðkomandi hjá persónum, sum eru búsitandi aðrastaðni enn í Føroyum, og sum hava vunnið rætt til eftirløn úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn er broytt.

Lógarbroytingin kemur í gildi 1. juli 2009.

Lógarbroytingin merkir, at persónur, ið lýkur niðanfyristandandi krøv, hevur rætt til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, sum hann hevur verið búsitandi í Føroyum, tó í mesta lagi 40 ár.

**Krøv:**

- Hevur fylt 67 ár.
- Hevur í minst trý ár, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, havt fastan bústað í Føroyum og verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum.

**Umsókn um arbeiðsmarknaðareftirløn**

Persónar, sum lúka nevndu krøv, og sum í dag eru búsitandi aðrastaðni enn í Føroyum, fáa bert eftirlønina veitta eftir umsókn.

Persónar búsitandi í Føroyum, nýtast ikki at søkja um at fáa eftirlønina útgoldna.

Umsóknarblað AM02 fæst á heimasíðuni hjá TAKS www.taks.fo, undir "Oyðubløð" ella við at venda sær til TAKS 35 26 00